FØROYA LØGMAÐUR

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
100 Tórshavn

**Svar**
**uppá**

**skrivligan fyrispurning nr. 84/2017 eftir tingskipanini § 52a til Aksel V. Johannesen, løgmann, frá Bill Justinussen, løgtingsmanni um tunlar norður um Fjall.**

**Fyrispurningurin var soljóðandi:**

1. Hvørjar ætlanir hevur samgongan við atliti at tunlum norður um Fjall?
2. Hevur løgmaður ætlanir um at finna breiða semju um tunlarnar millum allar flokkarnar á Løgtingi?
3. Heldur løgmaður, at verandi ferðsla gjøgnum tunlarnar norður um Fjall er nóg trygg, og at skúlabarnaflutningurin á hesi farleið kann halda fram óbroyttur?

**Svar:**

**Til spurningar 1, 2 og 3**

Sambært íløgukarminum hjá bæði verandi og undanfarnu samgongu standa tunlarnir norður um Fjall fyrst fyri tørni eftir Hvalbiartunnilin.

Landsstýrið setti tann 17. mai í ár ein arbeiðsbólk við umboðum fyri Samferðslumálaráðið, Fíggjarmálaráðið og Løgmansskrivstovuna at greina og gera tilmæli um, hvussu samferðsluundirstøðukervið mest skynsamt og skilabest kann byggjast út. Arbeiðsbólkurin hugdi eisini nærri at ymiskum fíggingarleistum.

Bólkurin er komin á mál við sínum arbeiði, og nú byrjar politiska viðgerðin.

Arbeiðsbólkurin mælir millum annað til at raðfesta tunlarnir norður um Fjall, tí farleiðin er ikki tíðarhóskandi longur.

Tað er ov tíðliga at siga, hvat úrslitið av politisku viðgerðini verður. Um tað eydnast at finna eina politiska semju, kunnu tunlarnir norður um Fjall verða gjørdir skjótari enn upprunaliga ætlað. Landsstýrið miðar eftir at fáa so breiða undirtøku fyri íløguætlanini sum gjørligt, og tí verður andstøðan í næstum boðin við í arbeiðið.

Tinganes · FO-100 Tórshavn · Føroyar
Tel. +298 306000 · Fax +298 306015 · info@tinganes.fo · www.tinganes.fo

FØROYA LØGMAÐUR

Í Tinganesi, 2. juli 2018

Aksel V. Johannesen
løgmaður